FØROYA REIÐARAFELAG

Tórshavn, 16. mars 2023

Hoyringsskriv til lógaruppskot um veiðigjøld

Fíggjarmálaráðið sendi 9. mars lógaruppskot um hækking av veiðigjøldum til hoyring, har freistin at svara bert er ein eina viku. Hoyringsfreistin er alt ov stutt, og tí eigur freistin at verða longd til 4 vikur, sum er vanlig hoyringsfreist til slík uppskot. Samanumtikið mælir Føroya Reiðarafelag til, at lógaruppskotið um hækking av veiðigjøldum verður tikið aftur og møguliga viðgjørt av nýggjum eftir summarfrítíðina. Greitt verður nærri frá grundgevinginum í hesum hoyringsskrivi.

Fiskivinnan góðtekur, at vinnan skal rinda eitt gjald fyri kvotur, um hetta gevur ein serligan vinning, men vinnan skal samstundis hava møguleika til at hava ein munandi vinning til íløgur og menning í fiskivinnuni.

Eingin orsøk er at skunda hetta uppskotið ígjøgnum, tí at flestu fiskasløgini eru liðugt fiskað, tá ið uppskotið kemur í gildi 1. august. Fiskiskapurin eftir svartkjafti og lodnu er liðugur, makrelvertíðin líður ímóti endanum tá og gjaldið fyri norðhavssild, sum verður fiskað í heyst, verður at kalla óbroytt. Harafturat kemur broytta gjaldið fyri botnfisk í Barentshavinum í gildi 1. januar 2024. Tí er eingin haldgóð orsøk til at skunda eitt slíkt týðandi uppskot ígjøgnum uttan ta neyðugu viðgerðina.

Verandi skipan gevur landinum nærum fullkomna trygd fyri, at landskassin fær inntøkur, men skapar samstundis sera stórar óvissur og vandamál hjá reiðaríum og manningum. Landið tekur ongan váða á seg, men leggur allan váðan á vinnuna. Bert um fiskurin hvørvur ella ikki kann veiðast, missir landið sínar inntøkur.

Verandi skipan varð samtykt í 2021, men kom ikki í gildi fyrr enn í 2022, og tí hevur verandi skipan bert virkað í eitt ár. Føroya Reiðarafelag mælir til, at veiðigjøldini ikki verða hækkað, men at verandi skipan sleppur at standa sína roynd. Tilmælið er greitt, at uppskotið verður tikið aftur, og at gjøldini vera óbroytt.

Yvirskipað er tað vánaligur vinnupolitikkur, at karmar og fortreytir fyri eini vinnu javnan verða broyttar. Tað hevur við sær eyka ótryggleika og óvissu í vinnuni, sum aftur viðførir minni íløguhug, tá fortreytirnar fyri kappingarførari fígging versna. Hetta er galdandi fyri fiskivinnuna í ólukkumát, har karmarnir blíva tiknir upp til nýggja viðgerð eftir hvørt løgtingsval. Í mun til ætlanirnar nú um at økja munandi um inntøkurnar frá veiðigjøldum, tykist orsøkin vera vaksandi almennar útreiðslur og vantandi javnvág á landsins fíggjarlóg.

Sakliga sæð er tann metta tilfeingisrentan í fiskivinnuni ikki varandi økt seinasta árið. Útreiðslurnar til eitt nú olju og rentur eru munandi øktar síðsta árið, sum eru varandi hægri rakstrarútreiðslur. Rentan hjá ECB er hækkað við 3 prosentstigum síðani juli í fjør og væntast at hækka við 1 prosentstigi afturat.

Stórar íløgur eru gjørdar í nýggj skip, hvørs lán og rentur skulu rindast aftur yvir stutt áramál. Prísirnir fyri fiskaúrdráttir á heimsmarknaðinum gjødu eitt lop í samband við inflatónina í fjør, men stórur partur av hesum inntøkuvøkstri endar hjá manningini, sum aftur rindar større helmingin í lønarskatti og vøruavgjøldum.

Boks 361 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 73 99 12 • Teldupostur: stefan@industry.fo

Váðar og vandar í verandi veiðigjøldum

Fíggjarmálaráðið staðfestir í almennu viðmerkingunum, at verandi skipan verður mett at virka væl. Henda staðfesting er gjørd uttan at hava nakað samskifti við fiskivinnuna um hetta. Henda viðmerking er misvísandi og kann ikki standa ósvarað. Reiðarafelagið hevur eyðmerkt fleiri váðar, sum fiskivinnan skal virka undir, har veiðigjøldini verða løgd afturat sum ein stórur váði. Hetta uppskotið ger bert ilt verri.

Verandi veiðigjøld verða roknað við støði í umsetninginum hjá skipunum, og tí eigur landið at vísa størsta varsemi, tá ið gjøld verða hækkað. Skipanin er einføld at umsita, men hevur onga trygd fyri, at skip ikki hava undirskot orsakað av veiðigjøldum.

Hesar váðar eigur landið at taka við í sína meting, tá ið veiðigjøld verða hækkað:

- Kvotur sveiggja nógv í mun til ICES ráðgeving og strandarlandaavtalur
- Fiskiskapur sveiggjar yvir tíðarskeið orsakað av ferðingarmynstri og stovnsstødd
- Oljuprísir sveiggja nógv og í 2022 var prísurin søguliga høgur
- Rentustøðið er hækkað munandi seinastu árini
- Gjaldið byggir á prísin árið frammanundan, og tað merkir ein stóran váða, tá ið gjaldið skal rindast
- Fleiri skip í uppsjóvarflotanum minkar um tilfeingisrentuna og harvið møguleikan at skatta
- Hýrur í Føroyum eru lutfalsliga høgar á uppsjóvarskipum og ikki tengdar at t.d. olju og rentum
- Politiskur váði í mun til veiðigjøld og aðrar fortreytir í vinnuni sum t.d. áramál á rættindum

Føroya Reiðarafelag hevur verið við til at gera eina skipan, har gjøldini kunnu hækka og lækka í mun til fiskaprísin, og tað er ein einføld og gjøgnumskygd skipan. Hendan skipan hevur havt við sær, at trý av fýra veiðigjøldum eru hækkað munandi. Gjaldið á sild hækkaði við 50%, gjaldið á svartkjaft við 25%, gjaldið á botnfisk í Barentshavinum er hækkað við meira enn 100% í mun til tað fasta gjaldið, sum var áðrenn. Bert makrelur er lækkaður við umleið 15%, av tí at prísurin lækkaði.

Hendan skipan er komin landinum til góðar, har tey flestu gjøldini eru hækkað og hava harvið givið landinum størri inntøkur. Inntøkurnar hjá landinum frá veiðigjøldum vóru 380 mió. kr. í 2022 og vera umleið 400 mió. kr. í ár. Hesar inntøkur eru nú methøgar. Tískil tryggjar verandi skipan, at hækkandi prísir geva landinum fleiri inntøkur, og landið hevur fingið fyrimun av hesi skipan.

Gjaldið verður í dag roknað av umsetninginum, og kann tí í prinsippinum merkja, at skattingin kann taka alt yvirskotið, um onnur viðurskifti ikki ganga eftir vild. Hetta merkir aftur, at landið skal vísa stórt hóvsemi.

Oljuprísurin er hækkaður nógv seinasta árið, men er nú fallin nakað. Tó er prísurin á einum søguliga høgum støði, og tað leggur stórt trýst á lønsemi í flotanum sum heild. Á sumri í fjør hækkaði prísurin til 10 kr. fyri liturin, og tað er óvanliga høgt.

Minkandi tilfeingisrenta

Um hugt verður eftir uppsjóvarflotanum í dag, so hevur landið gjørt av, at vit skulu hava 17 uppsjóvarskip í flotanum. Hetta talið var 10-12 skip fyri nøkrum árum síðani. Jú fleiri skip, vit hava í flotanum, tess minni er tilfeingisrentan. Hetta er eitt politiskt val, sum fleiri ymiskar samgongur hava tikið. Umráðandi er, at vit taka útgangsstøðið í verandi flota, tá ið gjøldini verða ásett.

Talið av skipum er ein politiskur spurningur, sum Føroya Reiðarafelag ikki hevur nakrar viðmerkingar til. Tó hevur hetta við sær, at tá ið talið av skipum økist, minkar tilfeingisrentan og harvið eisini møguleikarnir hjá tinginum at krevja inn gjøld.

Miðal úrslitið hjá uppsjóvarflotanum í 2021 var 18-19 mió. kr. pr. skip við støði í fimtan skipum. Skipini skulu hava møguleika at hava eitt munandi yvirskot, tá ið kvoturnar eru stórar, og fiskiskapurin er góður. Tað er eingin trygd fyri, at skip hava yvirskot, hóast prísurin er høgur, tí nógv onnur viðurskifti skulu ganga eftir vild.

Miðal skattatrýstið hjá teimum gomlu uppsjóvarskipunum seinastu fimm árini hevur verið útvið 60% við veiðigjøldum og partafelagsskatti. Nærum 60% av vinninginum endar sostatt hjá landinum, og 40% endar hjá reiðaríunum. Tískil fær landið longu nú bróðurpartin av øllum úrslitinum hjá uppsjóvarflotanum. Hetta býtið eigur ikki at verða skeiklað meira, og ongar grundgevingar eru fyri tí.

Útskifting av flotanum

Krøvini viðvíkjandi útláti og umhvørvi fara at økjast komandi árini. Landsins myndugleikar hava orðað ein veðurlagspolitikk, har málið er at minka munandi um dálkandi útlátið í skipaflotanum komandi sjey árini fram ímóti 2030. Ein fortreyt fyri hesum er, at fiskivinnan ger munandi íløgur í nýggj vinnutól og nýggja tøkni. Fiskivinnan hevur átikið sær uppgávuna og ger íløgur, men landið eigur ikki at forða hesum við sínum politikki.

Nýggju skipini, sum verða bygd í hesum døgum, lúka øll nýtímans krøv til at avmarka útlát, at hava orkusparandi motorar við minni útláti og at gagnnýta alt tilfeingið. Sostatt hava tey nýggju skipini alt annað líka lægri útlát og kunnu veiða somu ella størri nøgdir av fiski.

Ein meting frá einum nýggjum skipi er, at oljunýtslan er heili 10% lægri í mun til verandi skip. Harumframt hava nýggju skipini størri last, og tí er oljunýtslan pr. fiskað kilo lægri enn við verandi skipum. Eisini hava nýggju skipini betri køling og kunnu veita betri góðsku til virkini.

Um reiðarí skulu hava møguleika at skifta tey gomul skip út við nýggjari og meira umhvørvisvinarlig skip, er neyðugt at tey eisini hava møguleika at varðveita ein munandi part av avlopinum. Nýggj uppsjóvarskip kosta umleið 300-400 mió. kr. Hetta krevur tryggar karmar og pengasterkar fyritøkur, um hesar íløgur skulu gerast.

Ítøkiligar viðmerkingar

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur: *"Tað, at gjøldini hækka, so at størri partur av tilfeingisrentuni fellur til landið, ger at kravið til vinnuna um effektivitet og góð veiðitól økist. So hóast uppskotið viðførir ein fíggjarligan kostnað fyri vinnuna, vil tað ikki steðga vinnuni í at gera skilagóðar íløgur. Heldur tvørturímóti."*

Hugsanin er, at hægri veiðigjøld ikki forða vinnuni í at gera skilagóðar íløgur, men hinvegin eru við til at eggja til íløgur. Hetta er ikki rætt, og grundgivið er ikki fyri sjónarmiðinum. Fleiri reiðarí hava lítlan ella ongan møguleika at gera íløgur í nýggj skip, av tí at reiðaríini verða ov hart skattað. Vandin er, at føroyski flotin ikki verður endurnýggjaður, eins og hann skal, men at hann fer at dúva uppá eldri skip ístaðin. Hetta er ein ítøkiligur vandi, av tí at fleiri reiðarí ikki hava nakað serligt yvirskot til at fremja stórar íløgur.

Viðmerkingarnar staðfesta: *"Yvirskipað verður verandi skipan mett at virka væl. Skipanin er einføld, løtt at umsita og vinnan veit, hvat veiðigjaldið er, tá farið verður til fiskiskap."*

Hetta verður staðfest, uttan at Fíggjarmálaráðið hevur spurt fiskivinnuna ella kanna málið nærri. Arbeiðsbólkurin frá 2020 segði, at ein eftirmeting skuldi gerast, men tað er ikki gjørt, og kortini verða niðurstøður gjørdar uttan at spyrja vinnuna, ið livir við skipanini. Hetta er ikki ein niðurstøða, sum Føroya Reiðarafelag tekur undir við, tí skipanin hevur framvegis stórar váðar og óvissur.

Viðmerkingarnar siga: *"Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum."* Hetta er neyvan rætt, tí at lønarskattur og partafelagsskattur fara at minka í teimum økjum, har hesi skip hava heimstað. Tí verða nøkur støð í landinum harðari rakt enn onnur, um skipanin verður sett í verk.

Viðmerkingarnar siga: *"Í arbeiðinum til at evna verandi veiðigjaldslóg, skrivaði arbeiðsbólkurin, sum var mannaður við umboðum fyri vinnu og fyrisiting, at sum meginreglu eigur sama gjald at verða rindað fyri sama fiskaslag, fyri at gjaldið ikki skal vera vinnuliga skeiklandi og ikki skal virka sum ein eyka skattur. Við lógarbroytingini verður frítøkan fyri at rinda veiðigjald hjá heimaflotanum strikað. Harvið skulu øll, sum fáa makrelkvotu rinda sama veiðigjald."*

Viðmerkingarnar tykjast at siga, at arbeiðsbólkurin hevur mælt til at leggja gjald á heimaflotan. Hetta var ikki kortini ikki tað, sum arbeiðsbólkurin samdist um. Tískil kann frágreiðingin frá arbeiðsbólkinum ikki tulkast soleiðis, at hann hevur mælt til hesa broyting. Hetta brotið eigur tí at rættast.

Grunnar greiningar

Fíggjarmálaráðið hevur ongar váðametingar gjørt av hesum uppskotinum, og møguligar avleiðingar eru als ikki viðgjørdar í viðmerkingunum. Til dømis er greitt, at makrelgjaldið hækkar 30% frá 2026, men uppskotið greiðir bara frá hækkingum, sum henda í 2023. Hetta ger, at avleiðingarnar tykjast meira hóvligar og vandaleysar, men hetta er aftur ein ógvuslig hækking, sum fer at raka flotan meint.

Greitt er, at uppskotið leggur upp til ógvusligar hækkingar í øllum gjøldum. Størsta hækkingin er á botnfisk í Barentshavinum, sum hækkar 140%. Gjaldið í 2023 er 1,08 kr/kg við støði í einum miðalprísi uppá 21,50 kr/kg í 2022. Hevði sami miðalprísur verið galdandi í 2026, hækkar gjaldið upp í 2,58 kr/kg. Hetta kann taka grundarlagið undan flotanum.

Makrelgjaldið hevði hækkað nærum 30%. Gjaldið í 2022/23 er 1,23 kr/kg við støði í einum miðalprísi uppá 6,63 kr/kg. Um prísurin er tann sami í 2026, hækkar gjaldið til 1,59 kr/kg, sum er ein hækking uppá 29%.

Svartkjaftagjaldið hevði eisini hækkað nærum 30% við støði í prísinum higartil í 2023. Miðalprísurin higartil í ár er umleið 2,69. Hevði gjaldið verið stillað við verandi skipan, hevði tað verið 0,46 kr/kg. Hevði prísurin verið tann sami í 2026, hevði gjaldið verið 0,59 kr/kg, sum er ein hækking uppá 28,4%. Í 2022/23 er gjaldið á svartkjaft 0,31 kr/kg tó við støði í einum lægri miðalprísi, so talan hevði næstan verið um eina tvífalding í mun til gjaldið í dag.

Sildagjaldið hækkar umleið 10-15% við støði í einum miðalprísi uppá umleið 5 kr/kg, sum hann hevur gjørt í seinastuni.

Hetta eru dømi um, at broytingarnar í hesum uppskoti eru sera ógvusligar og taka eingi atlit til reiðarí og manningar, sum virka í fiskivinnuni. Talan er um eitt sera inntrívandi tiltak, sum als ikki er lýst á nakran hátt. Einasta útrokningin er, hvussu nógv landskassin fær í hægri inntøkum.

Viðmerkingarnar siga: *"Mett verður, at ein størri tilfeingisrenta er knýtt at rættindunum til at veiða makrel, sum ítøkiliga kemur til sjóndar gjøgnum teir handlar, har sonevndi heimaflotin selur makrelrættindi til nótaskip."*

Ógreitt er, hvat sipað verður til í hesum broti, men helst er talan um býtið, ið hevur verið galdandi, tá ið uppsjóvarskip hava fiskað makrel fyri trolarar. Hetta hevur tó einki samband við tilfeingisrentu, og talan er um at taka eitt tal úr einum samanhangi og seta tað inn í ein annan samanhang.

Tá ið uppsjóvarskip hava fiskað eina kvotu fyri trolarar og línuskip, hava summi reiðarí ynskt at geva manningini í heimaflotanum hýru burturav hesum avreiðingarvirði. Henda praksis hevur helst sín uppruna frá tíðini, tá ið uppsjóvarskip fiskaðu makrel saman við trolarum í ES sjógvi. Avreiðingarvirðið var høgt, fiskiskapurin effektivur og trolarin skuldi luttaka í fiskiskapinum at byrja við. Summi uppsjóvarskip kunnu gera hetta einstakar túrar fyri at stuðla teimum manningum, sum ikki hava eina høga hýru. Hetta kann als ikki tulkast sum virðið á rættindum ella eitt mát fyri tilfeingisrentu.

Veruleikin er, at hetta hevur einki samband við tað gjaldið, sum flotin kann bera. Í roynd og veru høvdu fleiri trolarar trupulleikar við at fáa uppsjóvarskip at fiska makrel fyri seg í fjør, og tí varð ein partur av hesum makreli ófiskaður. Eisini eru dømi um uppsjóvarskip, ið veiddu eftir hesum leisti, har manningin fekk minstuløn, tí at hýran gjørdist ov lág. Fíggjarmálaráðið misskilur sostatt hendan samanhangin.

Kappingarførið í vanda

Ein samfelagsbúskaparlig fortreyt fyri yvirhøvur at reka fiskiskap sum vinnuveg er, at fiskivinnan er altjóða kappingarfør. Føroysk fiskivinna selur stórt sæð allar sínar fiskaúrdráttir av landinum sum útflutning til marknaðir, har føroysku vørurnar eru í harðari kapping við vørur frá øðrum londum. Ein av týðandi fortreytunum fyri altjóða kappingarføri eru støðugir vinnukarmar og kappingarfør avgjøld og skattir, sum verða løgd á fiskivinnuna.

Grannalondini hava í summum førum eisini sett í verk skipanir við veiðigjøldum, og tað eru serliga Ísland og Grønland, ið hava lutfalsliga høg veiðigjøld. Tó eru veiðigjøldini fyri uppsjóvarfisk í 2023 munandi hægri í Føroyum enn í grannalondunum. Í Noregi eru eingi verulig veiðigjøld løgd á fiskivinnuna.

Útvald veiðigjøld í Íslandi, Grønlandi og Føroyum fyri 2023:

	Ísland	Grønland	Føroyar
Makrelur	0,17 kr/kg	0,40 kr/kg	1,23 kr/kg
Sild	0,17 kr/kg	0,25 kr/kg	0,89 kr/kg
Svartkjaftur	0,12 kr/kg	0,15 kr/kg	0,31 kr/kg
Lodna	0,27 kr/kg	0,15 kr/kg	0,98 kr/kg (uppskot)
Toskur	0,95 kr/kg	-	1,08 kr/kg (2,16 uppskot)
Hýsa	0,98 kr/kg	-	1,08 kr/kg (2,16 uppskot)

Greitt er, at almennu veiðigjøldini fyri uppsjóvarfisk eru væl hægri enn gjøld aðrastaðni, og hetta kann seta vinnuna í eina verri støðu í mun til vinnuna kring okkum. Verandi føroysku gjøldini fyri botnfisk eru eisini hægri enn íslendsku gjøldini fyri somu fiskasløg. Grønland leggur tó serliga gjøld á rækjur og svartkalva.

Landsstýrið tykist at halda, at ásetingin av veiðigjøldunum onga ávirkan fær á fiskivinnuna, tá ætlanin er at gera so ógvusligar hækkingar í veiðugjøldunum (í summum førum meira enn ein tvífalding) uttan nakra sakliga

grundgeving. Føroyska fiskivinnan er hvønn dag í harðari kapping við fiskivinnufyritøkur í øðrum londum, tí er tað als ikki líka mikið, hvussu landsstýrið ásetir veiðigjøldini í fiskivinnuni.

Fyri tað fyrsta ávirka veiðigjøldini beinleiðis rakstrarkostnaðin hjá føroysku fyritøkunum. Sum tað framgongur av talvuni omanfyri eru veiðigjøldini longu nú væl hægri enn í grannalondunum. Kostnaðarkappingarførið er fyrsta fortreytin fyri at klára seg á altjóða marknaðinum. Í altjóða høpi eru størstu føroysku reiðaríini sera smá í vavi, og tí eru føstu útreiðslurnar sum er væl hægri í mun til veiðimøguleikarnar.

Harafturat avmarka ógvusligar hækkingar í tilfeingisgjøldum bæði møguleikan og hugin hjá fiskivinnufyritøkum at gera íløgur í nýggj vinnutól, sum er onnur fortreyt fyri at klára seg í altjóða kapping. Fyri at kunna gera íløgur í nýggj skip og nýggja tøkni mugu fiskivinnufyritøkurnar vinna pening, tá íløgurnar í stóran mun skulu fíggjast við eginpeningi, tí váðin er so stórur. Hugurin at gera íløgur verður eisini avmarkaður av ógvusligum hækkingum í tilfeingisgjøldum, tá fyritøkurnar við góðari grund kunnu óttast, at økti produktiviteturin við nýggjum vinnutólum bert vil føra við sær enn hægri veiðigjøld.

Síðstu árini hava nøkur reiðarí gjørt munandi íløgur í nýggj skip, sum hevur hækkað støðið á vinnutólunum í mun til kappingarneytarnar í grannalondunum. Komandi árini skulu enn fleiri íløgur gerast í eitt nú orkusparing og umlegging til grønari orkukeldur. Í grannalondunum eru munandi stuðulsskipanir settar í verk til at stuðla undir hesa tilgongd. Ein ógvuslig hækking í veiðugjøldunum køvir hugin til at gera slíkar neyðugar íløgur. Tað kann í síðsta enda skaða altjóða umdømi Føroya, um vit ikki megna at skifta skipini út við meira umhvørvisvinarlig før. Hetta kann eisini skaða kappingarføri hjá øðrum útflutningsvinnum í Føroyum.

Revsing fyri miseydnaða uppboðssølu

Ein liður í uppskotinum er, at landið skal hava kompensatión fyri mista inntøku, tá ið veiðigjald skal rindast ístaðinfyri uppboðssølugjald. Fyrst hækkaði undanfarna samgonga øll gjøldini, tá ið hon tók við á heysti 2019. Síðani hækkaði undanfarna samgonga trý av fýra veiðigjøldum í nýggjari veiðigjaldslóg. Síðani hækkar hendan samgongan aftur gjøldini munandi í 2023 og heimaflotin skal eisini rinda. At enda skal landið hava kompensatión fyri "mistar" inntøkur frá uppboðssølugjøldum í 2026.

Síðani uppboðssølan varð skipað í 2018 og 2019 skulu gjøldini sostatt hækka fýra ferðir, um hetta uppskotið verður samtykt. Tískil er eingin saklig grundgeving fyri at hækka gjøld í 2026 vegna mistar inntøkur fyri uppboðssølugjøld.

Ein 8 ára kvota av norðhavssild varð í 2018 seld fyri 2,95 kr/kg, meðan miðalprísurin á feskari sild hetta árið var beint omanfyri 3 kr/kg. Tað vil siga, at landið seldi sildakvotur fyri umleið 90% av avreiðingarvirðinum í 2018. Árið eftir í 2019 seldi landið 8 ára sildakvotur fyri 2,46 kr/kg, og hetta var umleið 70% av miðalprísinum hetta árið. Hetta vitnar um eina miseydnaða uppboðssølu, har kappingin hevur ført til alt ov høgar prísir.

Nú tá ið hesar 8 ára kvoturnar renna út, skulu øll skipini fáa eina eyka rokning, av tí at landið missir inntøkur. Tað er ikki rímiligt at revsa reiðaríini, av tí at landið skipaða eina miseydnaða uppboðssølu. Landið hevur notið gott at einum ov høgum gjaldi hesi árini, men hetta eigur landið at taka ábyrgdina av. Hetta vitnar um eina hugsan, ið setir landskassan í miðdepilin, framum øll onnur atlit.

Tí eigur stigin, sum er settur inn at vera galdandi frá 2026, at strikast úr uppskotinum, tí at hetta er eitt óviðkomandi og ósakligt atlit, tá ið veiðigjøld verða ásett.

Botnfiskur í Barentshavinum

Uppskotið fyri Barentshavið er ein tvífalding av gjaldinum í mun til gjaldið í dag. Hetta kemur í gildi í 2023. Síðani er ein hækking uppá 140% sett at koma í gildi í 2026. Hetta er ein sera ógvuslig hækking, sum verður gjørd uttan veruliga viðgerð. Fíggjarmálaráðið metir, at landskassin hevur ein miss, tí at veiðigjøldini fyri uppsjóvarfisk eru hægri enn fyri botnfisk.

Tað er ósakligt at grundgeva fyri ógvusligu hækkingini av tilfeingisgjaldinum við at vísa til tað, sum landskassin missir av inntøku frá tilfeingisgjøldum á pelagiska fiskiskapin undir Føroyum, tí hesar kvotur eru latnar í býti við russar. Tilfeingisgjøld skulu grundast á eina meting av tilfeingisrentuni á fiskatilfeinginum, sum reiðarí hava fingið rættindi frá landinum at troyta. Tí er tað ikki rætt at knýta ásetingina av tilfeingisgjaldinum í Barentshavinum til tilfeingisgjøldini á pelagiska fiskiskapin undir Føroyum. Hendan grundgevingin staðfestir, at veruliga orsøkin til hækkingina av tilfeingisgjøldum er, at landskassin hevur brúk fyri fleiri inntøkum.

Her eigur at gerast sum ein heildarmeting, har tær samlaðu inntøkurnar hjá landinum frá Barentshavinum verða samanbornar við inntøkurnar frá uppsjóvarkvotunum. Hendan greiningin er ikki gjørd. Ein samanbering av veiðigjøldum og lønarskatti vísa hinvegin, at landið hevur vinning av avtaluni. Um hendan greiningin verður gjørd við støði í veiðigjøldum og lønarskatti hjá manningini, hevur landið eitt avlop av hesum býti. Tá sigur metingin, at landið hevur avlop uppá góðar 35 mió. kr. við støði í tølum fyri 2022 við verandi gjøldum.

Stórur vandi er fyri, at hesin nýggi flotin ikki hórar undan hesum gjaldinum, sum nú er sent til hoyring. Gjaldið verður tvífaldað uttan nærri greining ella váðameting av, hvat hendir við hesum skipum, íløgum og manningum. Hetta er ikki gott arbeiðslag, tá ið slík týðandi mál eru til viðgerðar. Hetta eru nýggj skip, sum taka alt í land, tey eru umhvørvisvinarlig og nýta minni olju og hava sera góðar umstøður til manningina.

Hesi viðurskifti eiga at verða tikin við, tá ið hetta uppskotið verður viðgjørt:

- Gjaldið verður meir enn fýrafaldað, síðan sáttmálarnir vórðu undirskrivaðir, um hetta verður samtykt.
- Skipini rinda nú 25-30 mió. kr. tils. í veiðigjøldum við norskum og russiskum sjógvi.
- Rentan er hækkað nógv seinastu tíðina og tað gevur eina eyka fíggjarliga byrðu.
- Rentur og avdráttir eru øktir nógv hjá hesum skipum.
- Fyribils meting sigur, at avkastkravið økist við meira enn 50 mió. kr. bara tað fyrsta árið
- Virðið á nýggja flotanum er 1,2 mia. kr.

Heimaflotin

Heimaflotin verður eisini hart raktur av hesum uppskoti, nú hann skal rinda veiðigjald av teimum makrelkvotum, sum hann hevur fingið tillutað í mong ár. Talan hevur verið um eitt týðandi ískoyti í teirra rakstri og hevur eisini verið við til at endurnýggja frystilínuskipini í ein ávísan mun. Hetta rakar tí hesar fyritøkur meint.

Tann roknaða tilfeingisrentan

Í tí almenna kjakinum hevur spurningurin um tilfeingisrentu í føroyskari fiskivinnu aftur verið til viðgerðar. Búskaparráðið hevur áður ført fram, at tilfeingisrentan í fiskivinnuni er meira enn 1 mia. kr. um árið við støði í roknskapum fyri 2017.

Føroya Reiðarafelag heldur ikki, at hendan greiningin er eftirfarandi, tá ið metast skal um tilfeingisrentu. Her verður í stuttum greitt frá nøkrum viðmerkingum, sum Reiðarafelagið hevur til hesa frágreiðing, og hvørji viðurskifti eru við til at skeikla úrslitið.

Í fyrsta lagi er miðalløn ov lágt mett, av tí at manningarnarpartarnir upprunaliga vórðu settir til 400.000 krónur, og hetta er ikki eitt eftirfarandi mát fyri normalløn hjá føroyskum manningum. Harumframt tekur greiningin ikki hædd fyri yvirmannapørtum, ið eru væl hægri enn manningarpartarnir. Harumframt er talið av ársverkum ov lágt mett, av tí summi skip eru úti í nógv fleiri dagar, enn eitt ársverk eigur at verða mett til. Hetta kann vera sera ymiskt frá skipi til skip, og tí má ein ítøkilig meting gerast av hesum.

Metingin frá 2017 segði t.d. at 685 mió. kr. av tilfeingisrentuni eru útgoldnar sum hýrur til føroyskar manningar. Hetta við støði í einum manningarparti uppá 400.000 krónur. Hetta er peningur, sum reiðaríini ikki kunnu rinda í veiðigjaldi, tí hann er longu goldin sum hýra, har landið síðani hevur fingið inntøkur ígjøgnum lønarskatt.

Metingin av kapitalapparatinum er eisini ov lágt mett, av tí at hon tekur støði í tí bókaða skipavirðinum. Um flotin er gamal, gerst roknaða normalavkastið ov lágt og harvið gerst roknaða tilfeingisrentan ov høg. Tess eldri flotin er, jú størri gerst tilfeingisrentan, og tað eigur ein slík greining at leggja upp fyri. Hetta merkir eisini, at útrokningin ikki tekur hædd fyri umsetningi og virksemi hjá skipum. Um eitt skip hevur lágt bókað virðið og stóran umsetning, gerst tann roknaða tilfeingisrentan serliga høg. Her er eingin samanhangur millum virksemið og roknaða tilfeingisrentu.

Harumframt verður hædd ikki tikin fyri, at fiskivinnan vanliga hevur upplivað stór sveiggj og livir við stórum óvissum frá ári til ár. Heldur ikki verður hædd tikin fyri, at politiska skipanin hevur ynskt at hava fleiri skip í uppsjóvarflotanum, og tað minkar um ta roknaðu tilfeingisrentuna.

Víst verður eisini til tey hoyringsskriv, sum verksmiðjutrolarar í Barentshavinum, Felagið Nótaskip og Felagið Línuskip hava sent Fíggjarmálaráðnum. Føroya Reiðarafelag tilskilar sær rætt til at senda fleiri viðmerkingar til uppskotið, um tað gerst neyðugt.

Vinarliga,

Stefan í Skorini, stjóri